

# VIL IKKI VERA PARTUR AV ATGERÐAR-LOYSINUM

**Hálvan desember fer Bente Wennerberg úr starvinum sum menningarstjóri á Landssjúkrahúsinum. Hon kann ikki góðtaka nýggja politiska rákið**

Randi Jacobsen

Seinast í august varð Allan Skaalum koyrdur úr starvinum sum stjóri á Landssjúkrahúsinum.

Tað gekk bara ein mánaður, so segði Bente Wennerberg upp sum menningarstjóri á Landssjúkrahúsinum og fer frá hálvan desember.

Hon hevur verið leingi í starvinum. Í hálvt annað ár virkaði hon sum ráðgevi, og aftaná tað, í næstan tvey ár, hevur hon verið í føstum starvi.

Bente Wennerberg sigur, at hon ikki hevur hug at halda fram longur.

- Eg haldi, at politiska rákið á sjúkrahúsøkinum er nakað heilt annað, enn tá ið eg kom higar. Nú er tað lokalpolitikkurin, sum ræður. Høvuðsraðfestingin hevur flutt seg frá, hvussu vit fáa besta sjúkrahúsverki fyri føroyingar, til at snúgva seg um, hvussu man kann halda gongd í smærru sjúkrahúsunum, og tí vil eg ikki vera partur av. Politiska stýringin, hóskar ikki til mítt starv, sigur Bente Wennerberg.

- Munurin á støðuni hjá mær og sjukrahússtjóranum Allan Skaalum er bara, at hann avgjørdi ikki sjálvur at fara. Eg kundi taka avgerðina sjálv, sigur Bente Wennerberg.

# Broytt eigaraviðurskifti í SMS

*Áður átti íslendska fyritøkan Hagar helvtina av partapeninginum í SMS í Føroyum.*

Tað ger Hagar ikki longur, tí Hagar fór av knóranum, tá ið allur íslendski búskapurin fór í spønir.

Jóhannes Jónsson, sum átti Hagar, hevur nú sjálvur yvirtikið allan partin hjá Hagar í SMS.

- Hetta broytir einki hjá SMS, sigur Niels Mortensen, stjóri.



# Friða baraldin í Svinoy

**Eigararnir í haganum, har mesti baraldurin veksur uppi á Svínoynni, eru fyri at friða økið fyri seyð**

Randi Jacobsen

Einasta oyggj, har baraldurrunnurin veksur villur, er Svínoy. Baraldurin veksur á einum stórum øki uppi á oynni.

Nú byggiætlan verður gjørd fyri Svinoy, verða nøkur øki løgd av sum grøn øki, og eitt av hesum økjunum er har, sum barldurin veksur.

Tað er langt síðan, at svínoyingar fóru at hugsa um at friða baraldin, og einaferð fekst ein játtan frá tí almenna. Tá keyptu tey hegn fyri millum 40 og 50 túsund krónur. Øll játtanin varð ikki brúkt, og restin fall tí aftur í landskassan.

Nú hevur Klaksvíkar kommuna søkt Innlendismálaráðið um stuðul til eina verkætlan fum at friða baraldin

Tað fer at kosta eitt sindur at flúgva hegn og jarnsteyrar niðan. Arbeiðið má gerast væl, tí vindhart er á oynni.

Økið liggur í haganum, sum eitur Handans túns triðingur fyri norðan ánna. Eigararnir eru umleið 20, og teir hava einki ímóti, at økið verður avhegnað, tí har veksur so lítið gras, sigur Eyðun Jacobsen, ein av eigarunum.

Plantuáhugað fólk hava stóran áhuga fyri baraldinum í Svínoy. Útferðir verða javnan gjørdir til Svínoyar, og gingið verður niðan á oynna. Tað hendir eisini, at einstaklingar fara niðan á oynna, sigur Eyðun Jacobsen.

# Nýggjur hvalvíks-prestur

Randi Jacobsen



Landsstýriskvinnan í mentanarmálum, Helena Dam á Neystabø fer at seta Bergtór Hjelm Bjarkhamar í starvið sum sóknarprestur í Hvalvík.

Tríggir umsøkjarar vóru til starvið, og kirkjuráðini vóru samd um at innstilla sum nummar eitt Bergtór Hjelm Bjarkhamar.

Hann er nýliga liðugur at lesa og gongur nú á pastoralseminariinum í Århus.

Bergtórur Hjelm Bjarkhamar er 32 ára gamal og hevur føroyska konu.

Hann og Anne Mette Klementsen, nýggi presturin í Fuglafirði, verða bæði prestvígd í Dómkirkjuni 16. Januar.